Álit

í

løgtingsmáli nr. 1/2026: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til ferðaútreiðslur (Tíðaravmarkað hækking av ferðastuðli)

Sirið Stenberg, Bjørg Brynhildardóttir Egholm, Høgni Hoydal, Liljan Weihe, Hervør Pálsdóttir, Eirikur í Jákupsstovu og Sámal Petur í Grund, løgtingsfólk, hava lagt málið fram 3. august 2026, og eftir 1. viðgerð 5. august 2026 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 20. august 2026.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í fíggjarmálum, Aksel V. Johannesen.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Helgi Abrahamsen, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, Bill Justinussen, Bjarni Hammer og Eyðgunn Samuelsen) hevur hesar viðmerkingar:

Endamálið við uppskotinum er at hækka ferðastuðulin við 5 krónum um dagin hjá øllum sum í dag fáa ferðastuðul.

Uppskotið skuldi eftir ætlan leggjast fyri Løgtingið í vár og skuldi tá, saman við uppskotinum um at hækka orkuískoytið, koma ístaðin fyri uppskotið hjá landsstýrinum um tíðaravmarkaða mvg frítøku av sølu av bensini og dieseli. Í viðmerkingunum til uppskotið verður sagt, at bæði uppskotini kosta 8,8 mió. kr. tilsamans, meðan uppskotið hjá landsstýrinum varð mett at kosta 20 mió. kr. Talan skuldi sostatt vera um eina sparing í mun til uppskotið hjá landsstýrinum.

Uppskotið hjá landsstýrinum bleiv samtykt, og teir pengarnir eru brúktir, so nú er talan um eina nýggja útreiðslu, sum kemur afturat útreiðslunum av uppskotinum hjá landsstýrinum.

Øll uppskot av hesum slagnum raka ikki bara rætt. Í hesum førinum gevur tað stuðul til bæði tey sum koyra við bensin- ella dieselbili, og eisini til tey sum hava elbil ella koyra við Bygdaleiðum, og tí ikki hava øktar útreiðslur orsaka av høgu oljuprísunum. Tað vil siga, at ein sum koyrir 29 km um dagin við bensinbili fær einki, meðan ein sum koyrir 30 km í elbil fær 5 krónur eyka um dagin.

Aksel V. Johannesen, landsstýrismaður, hevur upplýst fyri Fíggjarnevndini, at landsstýrið fylgir gongdini viðvíkjandi oljuprísunum, tí um verandi gongd heldur fram, er vandi fyri, at aðrar vørur

eisini fara at dýrka. Nýggjasta uppgerðin av brúkaraprístalinum er frá juni, og hon vísir, at prísvøksturin seinasta árið hevur verið 2,4 prosent, sum ikki er ein óvanligur prísvøkstur. Ein nýggj uppgerð av prístalinum kemur í september.

Fört hevur verið fram, at oljan kostar meira nú enn hon kostaði tá mvg-frítøkan varð sett í gildi í mai mánaði, men hóast hetta í løtuni er veruleikin í Føroyum, so eru prísirnir á altjóða marknaðinum lægri nú, enn teir vóru í mai. Tí er ikki óhugsandi, at prísirnir í Føroyum eisini fara at lækka nakað. Útlit eru tó fyri, at oljuprísirnir í eina tíð fara at verða hægri enn teir vanliga eru.

Hóast tað onkuntíð kann vera neyðugt at gera átøk, tá oljuprísirnir gerast óvanliga høgir, so heldur meirilutin ikki, at vit kunnu gera hjálparpakkar hvørja ferð prísirnir hækka. Landsstýrið eigur harafturímóti at fylgja við gongdini og meta um, nær tað er neyðugt at seta átøk í verk.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Ein minniluti (Sirið Stenberg) hevur hesar viðmerkingar:

Tá ið nýggja samgonga varð skipað, upplýsti landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, at hann vildi geva fólki ein lætta, tí høgu prísirnir vóru ein avbjóðing fyri húsarhaldini. Tað bleiv beinleiðis sagt, at oljuavgjaldið skuldi lækka. Hetta bleiv av ongum. Í staðin kom landsstýrið við einum tíðaravmarkaðum uppskoti um at frítaka bensin og diesel fyri mvg. Uppskotið skuldi eftir ætlan vera í gildi í 3 mánaðir, og metti kostnaðurin var 20 milliónir.

Andstøðan royndi tá at leggja fram lógaruppskot um at hækka orkuískoytið og ferðastuðulin. Hesi uppskot hildu uppskotssetararnir vera betri enn mvg-frítøkan av bensin og diesel, sum gav øllum bíligari bensin og diesel í eitt avmarkað tíðarskeið mitt í feriutíð. Uppskotini um orkuískoytið og ferðastuðul vóru málrættað til tey, sum veruliga hava tær lægstu inntøkurnar og tey, sum koyra langt til arbeiðis.

Møguleiki var tó ikki fyri at leggja omanfyri nevndu lógaruppskot fyri Løgtingið. Freistin fyri at leggja uppskot fram var farin, og samgongan noktaði at skriva undir, soleiðis at tey kundu leggjast fram. Hein minnilutin skrivaði undir, soleiðis at samgongan fekk lagt síni mál fram, men samgongan noktaði at skriva undir uppskotini hjá andstøðuni. Tí varð hetta uppskotið um at hækka ferðastuðulin lagt fram aftur beint eftir ólavsøku.

Mvg-frítøkan hjá landsstýrinum er nú farin úr gildi, og prísirnir á bensin og diesel eru hægri, enn tá skipanin varð sett í verk. Tá ið mvg-frítøkan varð sett í gildi, kostaði ein litur av bensini 13.33 kr., og í dag kostar liturin 14,56 kr. Tí er tørvurin á hjálp, um nakað, so nógv størri nú enn fyrr í ár.

Høgi bensinprísurin rakar sjálvsagt tey, sum koyra langt, harðast. Tað er nú einaferð so, at fólk mugu hava møguleika at búgva kring alt landið, og tá ið vit hava eina ávísa miðsavnan av størvum og tænastum, er neyðugt at ferðast. Tí kemur ferðastuðulin teimum til góðar, sum ferðast langt til arbeiðis.

Fyri at gera tað liviligt hjá fólki, sum ferðast til arbeiðis, mælir hesin minnilutin tí til at samtykkja uppskotið um at hækka ferðastuðulin.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Ein annar minniluti (Ruth Vang) hevur hesar viðmerkingar:

Hesin minnilutin var við í ætlanini at leggja júst hetta uppskotið fram í vár, umframt uppskotið um hækkað orkuískoyti sum alternativ til uppskotið hjá Aksel v. Johannesen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, at frítaka bensin og diesel fyri mvg í eitt tíðarskeið.

Yvirskipað kann grundgevast fyri og ímóti, hvørt tað er skynsamt og neyðugt at seta í verk hjálparátøk nú orkukostnaðurin hækkar, men hesin minnilutin var og er sannførd um, at um tað er neyðugt, so er eitt tað minst skynsama, ein kann gera, júst tað sum landsstýrið gjørdi, nemliga at gera bensin og diesel bíligari hjá føroyingum at keypa. Trot er á olju á heimsmarknaðinum og frægast er, at lata hækkandi prísin tilskunda føroyingum at tillaga oljunýtsluna til lækkandi útboðið. Um mett verður, at fólk verða ov hart rakt av hækkaðum orkuprísi, er rættari at stuðla fólki fíggjarliga, eitt nú við hækkaðum orkuískoyti og ferðastuðli.

Hóast lítið skynsamt, so valdi samgongan at gjøgnumføra mvg-frítøkuna og hevur harvið brúkt 20 mió. kr. til endamálið. Sum sagt, so heldur hesin minnilutin, at tað hevði verið rættari at framt hetta uppskotið, men nú 20 mio. kr. eru brúktar, fer hesin minnilutin ikki at taka undir við uppskotinum.

Við hesum viðmerkingum tekur hesin minnilutin ikki undir við málinu og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 26. august 2026

Helgi Abrahamsen formaður	Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur næstforkvinna	Bill Justinussen
Bjarni Hammer	Eyðgunn Samuelsen	Sirið Stenberg
	Ruth Vang	